# Happing verri enn kynsligur ágangur

Nýggj granskingarúrslit benda á, at happing er ein størri trupulleiki á arbeiðsplássum enn kynsligur ágangur. Kanadiskiar granskarar hava kannað úrslitini av ymsum verkætlanunum seinastu 21 árini, og teir staðfesta, at happingin ofta hevur drúgvari avleiðingar. - Kynsligur ágangur verður í minni mun góðtikið, og tí er hetta eitt øki, har nógvir samfelagsbólkar ofta royna at hjálpa. Hinvegin er happing ikki beinleiðis ólógliigt, og tí er sjáldan nøkur hjálp at fáa hjá teimum, sum verða rakt av hesum, sigur Sandy Hershcovics frá University of Manitoba. Og happing er veruliga eitt fyribrigdi, sum er sera væl kent. Epn.dk skrivar, at sambært donskum kanningum hevur 12. hvør arbeiðstakari upplivað happing á arbeiðsplássinum seinastu 12 mánaðirnar. Í flestu førunum er talan um happing frá starvsfeløgum, men happing frá leiðsluni er heldur ikki ókent. Um tvey prosent av donsku arbeiðstakarunum verða happað fleiri ferðir um vikuna, verur sagt. Kanadisku kanningarnar vísa, at ofta gevast fólk á arbeiðsplássinum orsakað av happing. Bæði tí starvsfólkini tá eru minni nøgd um arbeiðsplássið, men eisini tí tey upplivdu meira stress og angist.





*- Um tað frættist, at skip hava verið uppi í FAS, men er farin út aftur, tí skipanin ikki er nóg góð, er tað næstan ómøguligt at fáa aðrar upp í aftur. Hinvegin vísir tað seg, at er ein skipan fyrst byrja at veksa, er hon næstan "sjálvforsterkandi", segði Annfinn V. Hansen*

Hann vísti á, at tað tekur langa tíð at byggja upp álit, men onga tíð at missa tað.

- Um tað frættist, at skip hava verið uppi í FAS, men er farin út aftur, tí skipanin ikki er nóg góð, er tað næstan ómøguligt at fáa aðrar upp í aftur. Hinvegin vísir tað seg, at er ein skipan fyrst byrja at veksa, er hon næstan "sjálvforsterkandi", sum hann tók til, tí nógvir velja út frá, hvat onnur gera.

## Neutral skipan

Annfinn segði, at fyritreytin fyri, at vit yvirhøvur skulu hava FAS, er, at skipanin er kappingarfør á beinleiðis rakstrarútreiðslum.

- Tað merkir, at skipanin skal verða neutral á beinleiðis skattingini av lønum, soleiðis at skatting av hýrum hevur fulla afturbering. Í øðrum lagi skal skipanin verða "fortútsigilig" og kappingarfør í samband við gjøld til tað almenna, eitt nú við skatting av rakstrinum.

Hann segði, at tað eisini hevur stóran týdning, at politiskur og vinnuligur stabilitetur er í landinum, eins og vinnan skal kunna rokna við, at møguligir trupulleikar, sum kunnu stinga seg upp, verða loystir skjótt politiskt.

Formaðurin í Reiðarafelagnum fyri Farmaskip segði, at neyðugt verður at taka nationalkrøv burtur, tí sum er kunnu bert danskir ríkisborgarar mynstra sum skiparar.

- Vinnan er global, og slík krøv geva tískil onga meining, legði hann aftrat.

Sambært Anfinni verður eisini neyðugt at arbeiða aktivt fyri, at føroysk skip ella feløg ikki verða diskrimineraði. Tískil verður neyðugt at fáa í lag altjóða sáttmálar, fyrst og fremst við ES og EBS um frælsini og á skattaøkinum.

- Okkara FAS-skipan skal verða eitt alternativ til DIS og NIS, og vit eiga at marknaðarføra okkara skipan sum einaskandinaviska kvalitetsskráseting, segði hann.

## Hvat skal gerast?

Hann reisti eisini spurningin, hvat kann selja Føroyar innan shipping-vinnu.

- Grundleggjandi skattaviðurskiftini skulu vera í lagi, skrásetingarskipanin skal byggja á sama lógargrundarlag sum í hinum skandinavisku londunum og geva tryggleika fyri veðseting og øðrum.

Aftrat hesum, men ikki minst, nevndi Annfinn, at Føroyar eru ein sjóvinnutjóð við forstáilsi fyri vinnuni og kvalifiseraðum sjofólki, og vit hava longu nógv av tí, sum skal til fyri at veita neyðugu tænasturnar. Eisini er kostnaðarstøðið hjá okkum lægri enn eitt nú í Noregi – fyri somu tænastur.

Annfinn samanbar eisini Føroyar og Malta, har Malta hevur fleiri enn 1.200 skip í sínari altjóða skipaskrá, meðan vit hava út við 40.

Í fleiri førum eru fyrimunirnir hjá Malta eisini størri, eitt nú við skatti, ongum nationalitetskrøvum, ongum handilsforðingum og høgum tænastustøði. Í aðrar mátar eru viðurskiftini eins

## Global vinna

Annfinn V. Hansen legði dent á, at talan er ikki um at geva shipping-vinnuni nakað.

- Henda vinna er global, og kunnu Føroyar ikki brúkast, fer hon bara í annað land av virka. Samfelagið og tær tænastuveitingar, sum vinnan ynskir, verða taparar.

Hann helt, at um myndugleikarnir ikki vilja gera nakað, er bara at gevast á hendur, og so verður einki meira.

- Tað, sum vit hugsa um, er ikki at uppbyggja eitt AP Møller ella Torm í Føroyum. Ein nógv minni vinna gevur eisini eitt munandi íkast.

Annfinn nevndi eisini nakrar málbólkar, sum vit kunnu leggja okkum eftir.

- At hava føroyskar íleggjarar gevur størsta avkastið. Er skipanin her hjá okkum, er lættari at byrja. Yvirmenn vilja upp á land, tá ið tíðin gongur, og hesir kunnu arbeiða ymsastaðni. Hetta vil eisini minka um fráflyting av kvalifiseraðari arbeiðsmegi úr Føroyum.

Hann segði, at skandinaviski marknaðurin eisini er ein málbólkur. Her kunnu vit "lokka" við kappingarførum skatti og dugnaligum sjófólki.

- Ein vælvirkandi og dragandi FAS-skipan gevur eitt gott fíggjarligt íkast til Føroyar, mennir førleikar og vitan, tryggjar at vit eru á hægsta altjóða stigi, altjóðager vinnu og almenna geiran, gevur okkum størri altjóða ávirkan, skapar virksemi fyri umboðsfólk, sakførarar og grannskoðarar, fær útlendska vitan og kapital til Føroya.

Annfinn segði, at ein føroysk shipping-vinna kann verða við til at skapa útbúgvingar á hægsta stigi og verða viðvirkandi til vitanarbúskap, eins og vinnan skapar eitt maritimt útbúgvingarumhvørvi.

## 16 miljónir krónur

Formaðurin í Reiðarafelagnum fyri Farmaskip skar út í papp og segði, at talan er í prinsippinum um at "satsa" tær 16 miljónir krónurnar, sum landskassin fær í skatti um FAS-skipanina.

- Gera vit einki fyri at skapa nýggjar vinnuvegir og fáa tann sera einstáttaða føroyska búskapin víðkaðan, kunnu vit rokna við, at eisini hesin peningur verður mistur. Vit vóna, at talan ikki bert verður um tos, men av politikarar hesaferð meina tað í álvara, segði Anfinn V. Hansen á Shipping Føroyar 2008.